**Aksel V. Johannesen**
**vegna Javnaðarflokkin**

Løgtingsmál nr.     /2020: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri august 2020

# Uppskot
# til
# eykajáttanarløgtingslóg
# fyri august 2020

Løgtingið

# § 7 Uttanríkis- og mentamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -1.600 | -1.600 | - |
| Løguætlan | - | - | - |
| **Uttanríkismál** | | **-1.600** | **-** |
| 7.13.1. Sendistovur | | -1.600 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **7.13.1. Sendistovur** | | | |
| 01. Sendistovur (Rakstrarj.) | | 24.608 | - |
| | **EYJ**: | **-1.600** | - |

# § 11 Heilsumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 1.600 | 1.600 | - |
| Løguætlan | - | - | - |
| **Heilsumál** | | **1.600** | **-** |
| 11.20.2. Heilsutænastur | | 1.600 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **11.20.2. Heilsutænastur** | | | |
| 05. Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarj.) | J: | 9.154 | - |
| | **EYJ**: | **1.600** | - |

**Viðmerkingar**

Føroyska heilsuverkið hevur í fleiri ár havt alstóran tørv á fleiri læknum. Undanfarna samgonga skipaði tað soleiðis, at føroyskir læknar høvdu fyrstarætt til at taka sonevnda KBU, eisini nevnt turnus, í Føroyum. Hetta hevur fingið fleiri føroyskar læknar at koma heim aftur til Føroya. Men vantandi útbúgvingarstørv eru nú orsøk til, at fleiri føroyskir læknar standa uttan arbeiði í heyst. Umframt hesar eru eisini føroyskir læknar uttanlands, sum ynskja at koma heim at arbeiða.

Samanbera vit støðuna í føroyska heilsuverkinum við støðuna í danska heilsuverkinum, so eru munandi fleiri yngri læknar í starvi í Danmark. Gera vit tølini upp pr. 100.000 fólk, so svarar tað til, at tað eru 233 yngri læknar í Danmark og 105 yngri læknar í Føroyum.[1]

Landssjúkrahúsið og kommunulæknarnir hava boðað felagnum fyri yngri læknar frá, at tey høvdu viljað sett umleið 20 fleiri yngri læknar í starv, um fígging var tøk til hetta.

Uppskotssetararnir halda tað vera av avgerandi týdningi, at yngru læknarnir verða raðfestir. Hetta eru tað fleiri orsakir til:

- Tørvur er og fer at vera á fleiri læknum í føroyska heilsuverkinum.
- Yngru læknarnir kunnu lætta um hjá núverandi serlæknum og vera við til at minka um bíðilistarnar.
- Um fleiri yngri læknar fara at støðast í Føroyum í útbúgvingarstørvum, ið eru eitt stig á leiðini til at gerast serlækni, fer hetta eisini at vera eitt týdningarmikið stig til at loysa serlæknatrotið í Føroyum.
- Fleiri av yngru læknunum eru fluttir til Føroya við maka og børnum. Í fleiri ár hevur verið arbeitt fram ímóti fólkatilflyting heldur enn -fráflyting, og tí er tað burturvið, at vitan og fólk nú verða noydd av landinum aftur.

Um orsøkin var, at tað ikki var tørvur á fleiri læknum í Føroyum, var støðan ein heilt onnur. Men læknar og sjúkrahús standa klár. Tað er bert fíggingin, sum vantar.

Fyri at økja um fíggingina til yngri læknar restina av árinum, verður skotið upp at veita 1,6 mió. kr. í eykajáttan. Uppskotssetararnir mæla til, at upphæddin verður tikin av høvuðskontu 7.13.1.01, har 1,6 mió. kr. eru settar av á undirkontu 27 til at lata upp sendistovu í Ísrael. Uppskotssetararnir meta ikki, at tað er neyðugt við fleiri sendistovum, men meta harafturímóti, at tað er ovurhondsneyðugt at nøkta tørvin á læknum í heilsuverkinum.

---

[1] Hesum visti Kringvarp Føroya at siga frá í Degi og Viku fríggjakvøldið 31. juli.

**Á Løgtingi, 4. august 2020**

Aksel V. Johannesen